


**Komið við til Mývatn, njótið heita lónið og eitt sindur av fantastisku náttúruni í Íslandi – stutt sagt komið og verið góð við tykkum sjálvi í allarbestu umstøðum.**

Farið verður úr Føroyum við Norrönu tann 5. mei 2008. Tá øll eru komin umborð og klárt er at leggja frá landi, bjóðar royndi føroyski ferðaleiðarin, John B. Hansen, vælkomin.

Umborð njóta vit frálíku umstøðurnar, fara til stóra kalda borðið og frálíku morgunmatarbuffeina.

Í Íslandi gista vit á 4-stjørnaða Hotel Reynihlíð, sum liggur tætt við Mývatn. Mývatn er eitt tað kendasta og mest vitjaða staðið í Íslandi. Ei undur í – við vatni uppá heili 38-40 hitastig, er Mývatn avgjørt vert eina vitjan, serliga tá hugsað verður um, at verða góður við seg sjálvan.

Men skundi tykkum, tí plássið er avmarkað.

**PRÍSUR FYRI HVØNN KR. 4.690,-**

**EYKAGJALD FYRI EINAKAMAR KR. 650,-**

**Íroknað kostnaðinum er:** Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4-mans kamari, tó bert 2 persónar í hvørjum kamari. Stóra kalda borðið umborð bæði mánakvøld og mikukvøld. Morgunmatarbuffét umborð bæði týsmorgun og hósmorgun. Í Íslandi er gistingin á Hotel Reynihlíð, 3 x døgurði, 1 x morgunmatur og atgongd til baðistaðið íroknað.

**TEKNING FER FRAM Á NORÐOYA KUNNINGARSTOVU Á TLF. 45 69 39, MÁNADAG TIL FRÍGGJADAG MILLUM KL. 10.00 OG 16.00. SEINASTA FREIST AT TEKNA SEG ER 15. FEBRUAR KL. 12.00, OG MÁ FERÐIN EISINI GJALDAST TÁ.**

UM NÓG NÓGV TEKNA SEG, VERÐUR EIN EYKA FERÐ GJØRD 12. MEI 2008.

## SKRÁ

**Mánadag 5. mei**
Farið verður við Norrönu kl. 17.00.

**Týsdag 6. mei**
Komið verður til Seyðisfjarðar kl. 12.00, har bussur koyrir beinleiðis til 4-stjørnaða Hotel Reynihlíð. Á hotellinum fáa vit eina máltíð áðrenn farið verður til baðistaðin, har frálíkir møguleikar eru at slappa av. Koyrt verður síðani heimaftur til hotellið har borðreitt verður við 3-rætturs matskrá kl. 19.00. Barrin á hotellinum hevur opið so leingi, sum kundar eru.

**Mikudag 7. mei**
Aftaná morgunmatin verður ein útferð til heitu keldurnar, sum spræna damp himmalhøgt. Vit vitja eisini Dimmuborgina, har til ber at síggja staðnað lava. Síðani gongur leiðin aftur til baðistaðið, har møguligt verður at baða enn einaferð, áðrenn døgurði verður borðreiddur. Aftaná døguðran verður farið til Egilsstaðir, har vit steðga eina løtu fyri at shoppa. Síðani verður farið aftur til Seyðisfjarðar, har Norröna liggur klár at byrja ferðina heimaftur til Føroya.

**Hósdag 8. mei**
Komið verður á Havnina kl. 11.00.